**Søgu- og samfelagsdeildin bjóðar í heyst út tvey støk masterskeið í stjórnmálafrøði og tvey í løgfrøði, ið eftir umsókn kunnu gerast partur av masterútbúgving.**

**Politisk umboðan (stjórnmálafrøði)**

Skeiðið viðger ástøði um politiska umboðan, og tey lesandi læra at nýta hesi ástøði til at greina og lýsa viðkomandi dømi um politiska umboðan í Føroyum og umboðan av føroyskum áhugamálum í altjóða høpi.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í stjórnmálafrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar í viku 37 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av stjórnmálafrøði ella javnmettum fakum.

Kostnaður kr. 5.500

## Organisatiónsástøði og almenn fyrisiting (stjórnmálafrøði)

Skeiðið viðger hvussu organisatiónir virka, og hvussu fólk ávirka og ávirkast av organisatiónum. Tey lesandi fáa grundleggjandi kunnleika um og yvirlit yvir meginrák í organisatiónsástøði, og samstundis innlit í granskingarøkið “almenn fyrisiting” (public management) og meginrák innan almenna fyrisiting.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í stjórnmálafrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar í viku 36 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av stjórnmálafrøði ella javnmettum fakum.

Kostnaður kr. 7.500

**Føroysk Fiskirættindi í altjóða lóg (løgfrøði)**

Skeiðið viðger føroysk fiskivinnurættindi sum tey verða ásett í altjóða høpi og eftir altjóða lóg. Tey lesandi fáa innlit í týðandi rættarkeldur og gransking á økinum, eins og grundleggjandi førleikar at meta um høvi og loysnir á altjóða tilfeingisspurningum, serliga tengdum at fiskivinnurættindum.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í løgfrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar í viku 36 í 2010 og endar fyri heystfrítíðina.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum, eitt nú grundskeið í lóg.

Kostnaður kr. 5.500

---

**Føroyskur skattarættur (løgfrøði)**

Skeiðið viðger føroyskan skattarætt í lóg og venju. Tey lesandi fáa innlit í týðandi rættarkeldur og gransking á økinum, eins og grundleggjandi førleikar at meta um høvi og loysnir innan skattarætt.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í løgfrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar í viku 42 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum, eitt nú grundskeið í lóg.

Kostnaður kr. 5.500

---

Skeiðini eru treytaði av nóg stórari luttøku. Gjaldsskeið skulu gjaldast áðrenn skeiðsbyrjan. Lesandi innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn fáa tó skeiðið ókeypis.

Nágreiniligari lýsingar av skeiðunum finnast á www.setur.fo

Umsóknarblað fæst á www.setur.fo ella við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580.

**Avmarkað luttøka.**

Umsóknarfreistin er 14. august 2010. Tikið verður tó upp, til skeiðini eru fullsett. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 1. september 2010.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo